## Jon vil hava metið

Tað eru 20 mánaðir síani, at Jon Dahl Tomasson seinast skoraði í donsku landsliðstroyggjuni. Tí er hann framvegis á 51 landsliðsmálum, og tað er eitt færri enn tey 52, sum Poul Tist Nielsen á sinni skoraði fyri Danmark. – Sjálvandi vil eg fegin skora okkurt mál afturat, men vit skulu minnast til, at tað altso hevur gingið rættiliga væl hjá liðnum. Í Feyenoord havi eg skorað fimm ferðir í níggju dystum og lagt upp til fýra mál, so sum heild gongur tað hóast alt hampuliga væl, sigur Jon Dahl við BT.



## Bólkurin var avgjørdur

Franska landsliðið var eins ivaleyst móti Eysturríki, sum teir vóru tað móti Føroyum. Eysturríki. Eysturríki varð sent heim við 3-1 tapi, sum tó ikki hevði stórvegis ávirkan á støðuna í okkara bólki. Benzema, Henry og Gignac skutu málini í franska sigrinum. Millum hesi hevði Marc Janko minkað um munin til 2-1, men tann gleðin varð altso stokkut hjá eysturríkarum. Serbia vann okkara undankappingarbólk og fer beinleiðis til HM, meðan Frakland altso skal spæla play-off dystir í november mánaði.

# r í millum



**Føroyska liðið er sum ketan, ið ikki er sterkari enn veikasta liðið í henni. Í gjárkvøldið duttu fleiri burtur í millum, og tí bleiv tað ikki til meira enn tað sama**

Mynd: Rólant Waag Dam

munandi betri enn fyrri, har B36'arin millum annað fekk eitt óneyðugt og býtt gult kort fyri kjaftaslit.

### 10. Súni Olsen, 39/3

Átti frísparksinnleggið, sum Egil á Bø stútaði í netið. Vísti av og á, at hann er eitt støðið omanfyri fleiri aðrar á føroyska liðnum. Millum annað vendingin á egnari hálvu í fyrra hálvleiki, har hann setur tveir mans av, staðfesti hetta. Víkingurin arbeiddi aftur í dag væl aftur í vøllin og fekk vart fyri í nøkrum avgerandi støðum. Frameftir var tað mest við longum sendingum, sum eisini lógu sera væl – ein teirra gav mál.

### 11. Christian Lamhauge Holst, 18/2

Var aftur á liðnum, men hevði útgangsstøði í høgra borði. Hetta hevði við sær, at hann ikki fekk nakað serliga nógv burtur úr har úti. Kom betur eftir tí, tá hann og Símun Samuelsen skiftu síðu, soleiðis hann arbeiddi úr vinstru og inn í vøllin, men átti helst at verði brúktur sentralt frá byrjan av. Varð skiftur út eftir 70 minuttir, tá hann annars hevði spælt seg upp eina løtu. Vísti fleiri ferðir gjøgnum dystin, at hann er tann leikarin á føroyska liðnum, sum spælir í eini deild, sum er nakrar flokkar omanfyri Vodafonedeildina.

### 12. Bogi Løkin, 11/1

Kom inn og vann eitt fríspark beinanvegin. Royndi sítt úti í borðinum fyri Christian Lamhauge Holst, men við bara 20 minuttum á vøllinum er trupult at meta um avrikið hjá unga manninum.

### 14. Christian Høgni Jacobsen, 48/2

Fekk bara nakrar fáar minuttir á vøllinum, men upplivdi bæði eitt føroyskt og eitt rumenskt mál. Níggju minuttir er tó ikki nóg mikið til at meta um hansara avrik.

### 18. Arnbjørn Hansen, 7/1

Eitt gott korter fekk toppskjúttin í landskappingini í fjør á vøllinum. Lítið sást til hann hesa løtuna, sum ikki er nóg lang at meta um hansara avrik.